# »Eg gangi jú í skúla nú...
# ...har læri eg at liva og lesa, rokna, skriva«



*Bjørk er spent at byrja í skúlanum, hon er í nýggjari troyggju - og ur mást tú hava, tá tú fert í skúla, so tú ikki verður ov sein*

FYRSTI SKÚLADAGUR

**Tær 3 genturnar og 5 dreingirnir, sum byrjaðu í 1. flokki í Hvalvíkar skúla mikudagin, vóru sjálvsagt ógvuliga spent at fara í skúla. Fólkatalið í kommuni er nógv vaksið seinastu árini, og fyri fyrstu ferð í mong ár eru 4 flokkar í skúlanum har**

FYRSTI SKÚLADAGUR
*Orð & myndir:*
*Rúna Sivertsen,*
*runa@sosialurin.fo*

Mikudagin byrjaði skúlagongdin aftur í Hvalvíkar skúla, og vóru tað sjálvsagt tey børn, sum fyri fyrstu ferð skuldu í skúla, sum gleddu seg mest.

Næmingatalið er nógv vaksið seinastu árini, og í ár byrjaðu 49 næmingar í skúlanum móti 34 við ársbyrjan í fjør. Tað ger, at tað hetta skúlaárið verða fýra flokkar við fimm lærararum móti trimum flokkum og fýra lærararum í fjør.

Umframt tey átta, sum byrja í 1. flokki, vóru eisini fleiri onnur nýggj andlit at síggja í skúlanum. Fleiri av næmingunum hava búð uttanlands. Nøkur av teimum fingu eykaundirvísing í føroyskum í fjør, og í ár verða aftur fleiri nýggj, sum hava hesa undirvísing fyri neyðini. Umframt tað hevur Hvalvíkar skúli 5 næmingar, sum hava serligan tørv, so hesini lítli skúli kann sigast at hava fingið stórar avbjóðingar.

Eisini millum lærararnar vóru nýggj andlit at síggja. Tey bæði, Anetta Kalsoy og Alexandur Kristiansen, fara komandi skúlaár at undirvísa børnunum í Streymnesi og Hvalvík. Hinir tríggir lærararnir eru, Aslaug Olsen, sum er skúlaleiðari, Regin Paturssson og Jórun Egholm. Aslaug og Regin hava starvast við skúlan í eitt ár, so øll eru nýggj uttan Jórun, sum trúføst hevur starvast har í heili 40 ár.

Heðin Zachariassen, borgarstjóri sigur, at kommunan hevur roynt at skapt allar fortreytir fyri at fáa fólk at flyta til kommununa og tað hevur eydnast.

- Vit liggja væl fyri, miðskeiðis millum Havnina og Skálafjørðin, og so hava vit syrgt fyri, at fólk kunnu fáa børn síni ansaði, meðan tey eru til arbeiðis, sigur hann.

Í fjør fekk skúlin nýggj vindeygu, og í summarfrítíðini er el-hitin skiftur út við sentralhita.



*Aftara rað frá vinstru: Frank Arni Kjærbæk, Christian Johansen, Eyðun Hansen, Steingrímur Hallson og Rói Kollslíð.*
*Fremra rað frá vinstru: Bjørk Rúnadóttir, Malan Trygvadóttir og Tiffany Niclasen*



*Átta næmingar byrjaðu í 1. flokki í Hvalvíkar skúla mikudagin*





# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Skeiðsætlan fyri heysthálvuna 2004

### Leiðslumenning

| Skeið | Tíðarskeið | Tímar | Kl | Kostn. | Tilmelding |
|---|---|---|---|---|---|
| **Leiðaraútbúgvingar** | | | | | |
| Leiðaraútbúgving - LÚ | Byrjar 4. og 5. apr. 2005 | 320 | 09.00-16.00 | 34.800,- | innan 22. mar. |
| Grundleggjandi leiðaraútbúgving - GLÚ | 4., 5. og 6. okt., 1. og 2. nov., 6. og 7. des., 10., 11. og 12. jan., 14. og 15. feb. | 96 | 09.00-16.00 | 14.200,- | innan 21. sep. |
| Projektleiðaraútbúgving - PLÚ | 29. og 30. sep., 27. og 28. okt., 1. og 2. des. | 48 | 09.00-16.00 | 8.200,- | innan 16. sep. |
| Coaching útbúgving - COÚ | 18. og 19. okt., 8. og 9. nov. | 32 | 09.00-16.00 | 5.400,- | innan 5. okt. |
| Teambuilding útbúgving - TBÚ | 21. og 22. okt., 15. og 16. nov. | 32 | 09.00-16.00 | 5.400,- | innan 8. okt. |
| Leiðari, búskapur útbúgving - LBÚ | Tíðin ikki ásett | | | | |
| **Leiðsluskeið** | | | | | |
| Effektivur samráðingarteknikkur | 30. nov. og 1. des. | 16 | 09.00-16.00 | 3.200,- | innan 17. nov. |
| Starvsfólkasamrøður og torføra samrøðan | 28; 29; 30. sep. | 24 | 09.00-16.00 | 4.200,- | innan 16. sep. |
| Persónligur effektivitetur | 4. og 5. nov. | 16 | 09.00-16.00 | 3.200,- | innan 22. okt. |
| Styrk tína persónligu førleikamenning | 22.og 23. nov., 7. jan. | 24 | 09.00-16.00 | 4.200,- | innan 9. nov. |

### Handilsliga økið

| Skeið | Tíðarskeið | Tímar | Kl | Kostn. | Tilmelding |
|---|---|---|---|---|---|
| **Søla, tænasta, marknaðarføring og útflutningur** | | | | | |
| Søla og tænasta | 26. okt (09-16) og 10. nov. (09-12) | 12 | sí Tíðarsk. | 2.400,- | innan 13. okt. |
| Umdømi og samleiki | 3. og 18. nov. | 16 | 09.00-16.00 | 3.200,- | innan 20. okt. |
| **Búskapar- og roknskaparlæra** | | | | | |
| Innleiðsla í roknskap og skatt | 13. og 15. sep. | 8 | 17.15-20.30 | 1750,- | innan 31. aug. |
| **Mál** | | | | | |
| Føroyskt | 14., 21. og 28. sept., 5. og 19. okt. | 15 | 15.30-18.15 | 2500,- | innan 1. sep. |
| Føroyskt fyri útlendingar | 16., 23. og 30. sep., 7., 21. og 28. okt., 4., 11., 18. og 25. nov. | 36 | 09.00-12.00 | 4700,- | innan 3. sep. |
| Business English | 18; 25. okt., 1., 8., 15., 22; 29. nov., 6. des. | 20 | 15.00-17.30 | 3.300,- | innan 5. okt. |
| Enskt fyri ferðavinnuna | 8., 15., 22. og 29. sept., 6. okt. | 15 | 16.00-18.45 | 2.500,- | innan 26. aug. |
| **Skeið innan almennu fyrisitingina** | | | | | |
| Starvsfólkarættur I | 29. og 30. sep. | 16 | 08.30-16.00 | 3.300,- | innan 16. sep. |
| Starvsfólkarættur II | 27. og 28. okt. | 16 | 08.30-16.00 | 3.300,- | innan 14. okt. |
| Fíggjarskipan Landsins | 16. og 17. nov. | 16 | 09.00-16.00 | 3.300,- | innan 3. nov. |
| **Skeið um lógir og kunngerðir** | | | | | |
| KT trygd | 6. sep. | 10 | 08.15-16.30 | 2.000,- | innan 24. aug. |
| Keypilógin | 8. nov. | 10 | 08.15-16.30 | 2.000,- | innan 26. okt. |

### KT økið

| Skeið | Tíðarskeið | Tímar | Kl | Kostn. | Tilmelding |
|---|---|---|---|---|---|
| Modul 2 - Windows | 30. aug., 2. og 6. sep. | 12 | 08.30-12.15 | 1.750,- | innan 17. aug. |
| Modul 3 - Word | 9., 13., 16. og 20. sep. | 16 | 13.00-16.30 | 2.320,- | innan 27. aug. |
| Modul 4 - Excel | 23., 27. og 30. sep., 4. okt. | 16 | 08.30-12.15 | 2.320,- | innan 10. sep. |
| Modul 5 - Access | 18., 21., 25. og 28. okt. | 16 | 08.30-12.15 | 2.320,- | innan 5. okt. |
| Modul 6 - Powerpoint | 1. og 4. nov. | 8 | 13.00-16.30 | 1.450,- | innan 19. okt. |
| Modul 7 - Internet/Outlook | 8., 11. og 15. nov. | 12 | 13.00-16.30 | 1.750,- | innan 26. okt. |
| Modul 1 - Grundskeið í teld | 18., 22. og 25. nov. | 12 | 13.00-16.30 | 1.750,- | innan 5. nov. |

### Tekniska økið

| Skeið | Tíðarskeið | Tímar | Kl | Kostn. | Tilmelding |
|---|---|---|---|---|---|
| Grundleggjandi meistaraútbúgving | 22. & 23. sep., 20. & 21. okt., 24. & 25. nov. | 48 | 09.00-16.00 | 7.500,- | innan 8. sep. |
| Autocad grundskeið | 19; 20; 21; 26; 27. og 28. okt | 24 | 18.00-21.10 | 3.500,- | innan 5. okt. |
| Trygdartiltøk í samb. við L-AUS | 15. sep. | 8 | 09.00-16.00 | 1.200,- | innan 1. sep. |
| Trappur | 4. okt.(09-16), 5. okt.(09-16) & 6. okt.(12-16) | 20 | sí Tíðarsk. | 2.700,- | innan 21. sep. |
| Kennur tú bil tín? | 23. okt. | 4 | 10.00-14.00 | 750,- | innan 9. okt. |
| Grundskeið í sveising | 1; 2; 3; 4; 5. nov. | 40 | 09.00-16.00 | 5.200,- | innan 18. okt. |
| Grundleggjandi antennu tøkni | 17. og 18. nov. | 16 | 09.00-16.00 | 2.200,- | innan 3. nov. |
| Skeið í kloakkering | 10. og 11. nov. | 16 | 09.00-16.00 | 2.200,- | innan 27. okt. |

**Skeiðsinnihald og tilmeldingarseðil er á okkara heimasíðu www.skeidsdepilin.fo**

Marknagilsvegur 77 · Postrúm 177 · 110 Tórshavn
tel 318813 · Fax 313374 · info@skeidsdepilin.fo

www.skeidsdepilin.fo

team85 358000